Kaj Leo Johannesen:

# Ein sigur fyri rættvísi at hongja Saddam Hussein

**Formaður sambandsfloksins heldur, at rættvísi sigraði, tá ið Saddam Hussein varð hongdur**

DEYÐAREVSING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Saddam Hussein hevði uppiborið at verða dømdur til deyða.

Tað heldur Kaj Leo Johannesen, formaður sambandsfloksins.

Tað eru ógvuliga fáir politikarar í Føroyum, sum hava sagt sína hugsan um, at gamli einaræðisharrin í Irak varð dømdur til deyða

Hann varð avrættaður í lýsingini leygarmorgunin, klokkan seks í Irak og klokkan trý leygarnáttina okkara tíð.

Men ein av teimum, sum hevur eina meining um hetta og sum torir at siga hana hart, er formaðurin í Sambandsflokkinum.

Hann heldur, at Saddam Hussein fekk ein rættvísan dóm og at hann hevði uppiborið at verða dømdur til deyða og avrættaður fyri tær illgerðir hann hevur staðið á odda fyri í Irak.

Hesa greiðu støðu hevur formaðurin í sambandsflokkinum, hóast bæði Amnesty International og nógvir aðrir felagsskapir og einstaklingar hava funnist hvassliga at deyðadóminum.

Tá ið Saddam Hussein varð tikin, segði Amnesty International í Føroyum, at eins og øll onnur, skal eisini hann tryggjast eina rættargond eftir altjóða reglum.

Amnesty er ímóti deyðarevsing og er tí eisini ímóti at Saddam Hussein varð dømdur til deyða og avrættaður.

Dømir irakiska fólkið Saddam Hussein til deyða, eru tey við til at rættvísgera ein revsingarhátt, sum tey sjálvi hava mótmælt, at hann hevur brúkt seinastu 25 árini, heldur felagsskapurin.

- Sterkasti mátin at gera upp við fyrrverandi einaræðisharran, hevði verið at dømthann lívlangafongsulsrevsing. Á tann hátt hevði Irak steðgað siðvenjuni hjá Saddam-stýrinum at avrætta mótstøðufólk síni.

- Verður Saddam Hussein avrættaður fer tað at seta arbeiðið móti deyðarevsing fleiri ár aftur, segði Amnesty International í Føroyum, tá ið Saddam Hussein varð tikin.

### Ótrúliga positivt

Men hetta ávirkar ikki formannin í sambandsflokkinum í hesum føri.

Hann kann ikki fegnast um, at lívið verður tikið frá einum øðrum menniskja.

Men hann heldur, at tað er "ótrúliga positivt" at Saddam Hussein hevur fingið tað revsing, hann hevur uppiborið.

- Tað vísir bara, at rættvísi er til – fyri øll, leggur Kaj Leo Johannesen afturat.

- Ein og hvør gerð hevur eina avleiðing. Og nú Saddam Hussein varð avrættaður, er tað rættvíst, tí hann hevur sjálvur tikið so nógv lív og eisini hann má taka ábyrgdina av sínum gerðum, sigur formaðurin í Sambandsflokkinum.

Kortini Kaj Leo Johannesen ikki heilt tryggur við deyðarevsing annars, tí hann staðfestir, at tað er onki dulsmál at bæði húðalitur og onnur óviðkomandi viðurskifti hava ein vissan týdning fyri, hvør verður dømdur til deyða.

- Og tað má ikki henda, at ein tann einasti ein verður dømdur til deyða ósekur.

Hann heldur at tað er ómetaliga torført at taka støðu til deyðarevsing sum heild. Tað heldur hann ikki, at vit kunnu gera, fyrrenn tað er ein av okkara egnu næstringum, sum hava verið fyri einum álvarsligum brotsverki, so at vit føla tað á egnum kroppi.

- Tað verður ikki fyrrenn eg sjálvur komi í eini slíka



*Formaður sambandsfloksins, Kaj Leo Johannesen, heldur, at tað er "ótrúliga positivt" at Saddam Hussein fekk ta revsing, hann hevði uppiborið*

støðu, at eg kann siga við fullari vissu um eg eri fyri deyðarevsing ella ikki, sigur Kaj Leo Johannesen.

- Men eg kann ikki lata vera við at skilja, at fólk, sum hava verið fyri álvarsligum brotsverki, taka undir við deyðarevsing.

- Men fyri Saddam Hussein kann tað sigast stutt, at rættvísi sigraði, sigur Kaj Leo Johannesen.

# Amnesty harmast um útsøgnina hjá Kaj Leo

**Forkvinnan í Føroya deildini hjá Amnesty International hevði ikki væntað tílíkar útsøgnir, sum tí hjá Kaj Leo í einum landi sum okkara**

*Niels Uni Dam*

- Eg harmist um slík úttalilsi, tað má eg siga, sigur Annika Sølvará forkvinna í Føroya deildini hjá Amnesty International, um útsøgnina hjá formanni Sambandsflokksins Kaj Leo Johannesen, um at avrættingina av Saddam Hussein. Hon heldur fram:

- Tað er ikki talan um rættvísi at avrætta nakran, heldur ikki Saddam Hussein. Øll fólk hava krav uppá og rætt til eina rættvísa rættargongd, og fyri okkum er deyðarevsing ongantíð ein optión. Eg havi ikki hug til at viðmerkja ov nógv, um útsøgnina hjá Kaj Leo. Ikki annað enn at eg harmist um hetta, og at eg ikki hevði væntað tílík úttalilsi í einum landi sum okkara, har deyðarevsing ikki verður sæð sum ein møguleiki, sigur Annika Sølvará.

Hon gleðist samstundis um, at vit liva í einum landi, har politiska skipanin hevur valt ikki at góðtaka hetta sum revsimøguleika.

- Tað er gleðiligt at síggja, at man í eini komandi stjórnarskipan hevur valt, at løggeva ímóti deyðarevsing og beinleiðis nevnir hetta í henni, sigur Annika Sølvará.

Hon heldur tvørturímóti tí, sum Kaj Leo sigur, at tað er ein ósigur fyri rættvísi at avrætta Saddam Hussein:

- Hetta at avrætta ein diktator ger, at man ikki fær gjørt upp við hansara misgerðir. Man fær ikki sett hann til svars fyri øll hini brotsverkini, sum hann hevur gjørt, og tey málini koma ongantíð fyri rættin. Harafturat verður hann nú pínslaváttur í Irak, og tað ger ikki støðuna betri., sigur Annika Sølvará at endans.



*Annika Sølvará forkvinna í Føroya deildini hjá Amnesty International,*

# Vinna ikki rættvísi við at taka lív

**- Deyðarevsing kann undir ongum umstøðum góðtakast í einum samfelag, sum byggir á fólkaræði, sigur løgmaður í viðmerking til, at Saddam Hussein er tikin av døgum**

SADDAM HUSSEIN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Uttan mun til hvussu álvarsamt brotsverk eru, kunnu vit ongantíð vinna rættvísi við at taka lív. Deyðarevsing eigur als ikki at finna stað.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, í einari viðmerking til, at Saddam Hussein varð tikin av døgum í morgun.

Løgmaður sigur, at deyðarevsing kann undir ongum umstøðum góðtakast í einum samfelag, ið byggir á fólkaræði.

- Ætlanin við Irakkrígnum segðist júst vera at vinna irakska fólkinum fólkaræði og tryggleika. Men hetta er nú tvørturímóti vorðið eitt høpisleyst kríggj, har alt fleiri lata lív, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann leggur afturat, at tað er neyvan nakað sum bendir á, at avrættanin av Saddam Hussein fer bøta um støðuna í Irak.


Forkunnugt seminar - 25. januar '007!

**Styrk kappingarevnið hjá fyritøkuni, brúka fíggjarstýringina strategiskt!**

- seminar til fíggjar- og roknskaparfólk og fólk við fíggjarábyrgd

Nú bjóða vit eitt forkunnugt seminar um moderna fíggjarstýring og kostnaðarroknskap - ABC (Activity Based Costing).

Ein av fremstu serfrøðingunum í DK innan fíggjarstýring, Per N. Bukh verður seminarleiðari. Bukh er professari í fíggjarstýring við Aalborg Universitet og hann hevur skrivað fleiri bøkur og greinar um evnið. Harnæst er hann redaktørur av hondbókunum "Økonomistyring" og "Offentlig Ledelse", Børsen leiðsluhondbøkur.

Á seminarinum fært tú íblástur, meirvitan og møguleika at hitta onnur við áhuga fyri fíggjarstýring.



Avmarkað pláss - tilmeldingarfreist 4. januar 2007!

Tekna teg og les meira á www.synergi.fo ella ring 22RING

Synergi